# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðfeingisdeildina G1

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, har grundleggjandi sjúkrarøkt skal samantvinnast við háteknologi og arbeitt verður við at fáa intensivu víðariútbúgvingina heim til Føroyar, so er møguleikin her.

Okkum tørvar sjúkrarøktarfrøðingar til føst størv og avloysarastørv frá 1. mai 2008, - ella so skjótt, sum til ber. Starvsbrøkur eftir avtalu.

Bráðfeingisdeildin er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum, sum umfata intensiva deild, viðrakning, skaðastovu, bráðmóttøku og læknavaktina.

Tú kemur, alt eftir tørvi og førleika, at hava ymiskar arbeiðsuppgávur, og ta fyrstu tíðina er talan í høvuðsheitum um tað intensiva økið.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- góða innleiðslu og skipaða upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar
- starvsfelagar við góðum fakligum førleika
- starvsfelagar, ið ynskja at arbeiða í einum mennandi umhvørvi
- ein spennandi arbeiðsdag við góðum møguleika fyri egnari menning
- at arbeiða triðja hvørt vikuskiftið

**Tú hevur:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í viðgerð og røkt av sjúklingum við intensivum og bráðfeingis tørvi
- medferðarkenslu og kanst skjótt skapa tær yvirlit
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og kreativt
- hug til fakliga menning og avbjóðingar
- góð samstarvsevni og er fleksibul
- eitt opið og jaligt sinni
- møguleika at arbeiða í skiftandi vaktum, dag-, kvøld- og náttarvaktum
- teldukunnleika
- hug og vilja at arbeiða við egnari fakligari menning og førleika
- ábyrgdarkenslu fyri at skapa góðan trivnaða á deildini

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Margit Stórá, deildarleiðara á G1, lokal 5811, lsmarst@ls.fo ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, lsnaina@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 11. apríl 2008 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingar til B6

Vegna barnsburð søkja vit eftir 2 sjúkrarøktarfrøðingum fulla tíð í skiftandi vaktum til setan 1. mai 2008 ella eftir avtalu til og við 31. januar 2009. Møguleiki er fyri lægri brøki.

Á nýumvælda B6, sum lat upp 7. mars 2008, er ein palliativ eind á deildini við tveimum einastovum. Aðrar spennandi avbjóðingar liggja eisini fyri framman við implementering av THS (Talgild Heilsu Skipan).

B6 er ein medisinsk deild, sum tekur móti elektivum og akuttum vaksnum sjúklingum. Deildin hevur pláss fyri 15 sjúklingum og hevur hesar sergreinar: "gastroenterologi, neurologi, endokrinologi, palliatión og onkologi". Arbeitt verður eftir kontaktpersónsskipanini.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevdu sergreinar

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

Fyrimunir hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Ingun Gaardbo, deildarleiðara á B6, lokal 6036, lsingga@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 16. apríl 2008 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Føðideildina

Vegna farloyvi søkja vit eftir 2 sjúkrarøktarfrøðingum á starvsbrøki 0,6 og 0,7 í skiftandi vaktum til setan 1. mai 2008 til og við 31. desember 2008. Møguleiki er fyri leingjan.

Føðideildin A2 er ein samansett eind við fýra ymiskum sergreinum.
Málið fyri deildina er at veita viðgerð og røkt til barnakonur og nýfødd børn.
Hetta verður gjørt í tøttum tvørfakligum samstarvi millum fakbólkarnar, sum eru tilknýttir deildini og heilsuskipanini annars.
Deildin er eitt spennandi og mennandi starvsstað við nógvum framtíðar avbjóðingum.

**Tú hevur:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- hug til tvørfakligt samstarv
- ynski um mennandi avbjóðingar
- ynski um ávirkan á fakligu menningina
- kreativitet og fleksibilitet

Upplýsingar um størvini fáast við at ringja 304500 til Miu Pedersen, deildarleiðara, lokal 5022
ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102.

**Umsóknarfreistin er 15. apríl 2008 kl.12.00**

## Onnur størv (sí meira á www.lsh.fo)

**Sálarfrøðingur**
Umsóknarfreistin er 28. mars 2008

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G3**
Umsóknarfreistin er 31. mars 2008 kl. 12.00

**Læknaskrivaranæmingar**
Umsóknarfreistin er 31. mars 2008 kl. 12.00

**Sjúkraflutningstænastan**
Umsóknarfreistin er 2. apríl 2008

**Radiografar/Røntgensjúkrarøktarfrøðingar**
Umsóknarfreistin er 11. apríl 2008

**Deildarleiðari til Ljósmøðratænastuna**
Umsóknarfreistin er 28. apríl 2008

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

W W W . S O S I A L U R I N . F O